

Pallurin er við at koma uppá pláss á Solan oljuleiðini eystan fyri føroyska markið.

# Rigga til nýggja oljuframleiðslu eystan fyri føroyska markið

Deil:

**Jan Müller**

14.09.2014 - 12:31

Oljan.fo

Um somu tíð sum oljufeløgini, ið leita eftir olju og gassi á føroyska landgrunninum, eru í ferð við at eftirmeta tær báðar boringarnar í summar, verður hildið fram at menna og útbyggja oljukeldur hinumegin markið.

Hjá bretska oljufelagnum “Premier Oil” er hýrurin góður í hesum døgum. Orsøkin er tann, at alt hevur gingið sum fótur í hosu at gera klárt til fyrstu oljuframleiðsluna hjá felagnum á Atlantsmótinum tvs. millum Hetland og føroyska markið.

Nú um dagarnar varð ein risastórur goymslutangi og ein pallur sett upp á Solan oljuleiðini sunnan fyri oljukelduna Schiehallion.

Talan er um eina av smærri oljukeldunum vestan fyri Hetland, tó at hon er mett at goyma 40 mill. tunnur av olju. Ætlanin verður dagsframleiðslan 24.000 tunnur og sær fyrsta oljan dagsins ljós seinni í ár.

Áðrenn tað skulu borast fýra brunnar aftrat. Talan er um eitt nýtt jarðfrøðiligt øki og er sjálv útbyggingin rættiliga einastandandi. Ætlanin er, at pallurin skal vera ómannaður, tá eitt ár er farið. Stóri tangin fer at goyma oljuna, sum síðani verður pumpað upp í tangabátar.

Premier Oil er fyristøðufelag og eigur 60% av kelduni.

